# Obama líka væl umtóktur sum Reagan

Tríggir fjórðingar av amerikanska fólkinum vænta, at komandi forsetin, Barrack Obama, verður ein sterkur leiðari, og sambært CNN eru tað mong ár síðani, at amerikanarar hava havt so gott álit á einum komandi forseta. Serfrøðingar siga við CNN, at vit skulu heilt aftur til januar í 1981, tá Ronald Reagan tók við sum forseti. Til samanberingar nevnir sjónvarpsstøðin, tá George W. Bush tók við í januar í 2001, væntaðu 60 prosent, at hann fór at verða ein sterkur leiðari. Tað sama søgdu 67 prosent um Bill Clinton, tá hann tók við í januar í 1993.



# SAS verður selt skjótt

Fyrst ljóðaði, at týska flogfelagið Lufthansa var sinnað at keypa skandinaviska felagið SAS. So frættist, at týskararnir høvdu ikki hug at keypa kortini, men nú ljóðar, at keypshugurin er komin aftur á teir. Jyllands-Posturin veit at siga, at nevndin í Lufthansa hevur umrøtt SAS á teimum seinastu fundunum, og ein talsmaður hjá Lufthansa sigur, at Norðurlond eru ein spennandi marknaður fyri týska felagið. SAS hevur fíggjarligar trupulleikar og hevur millum annað kravt, at starvsfólk fara niður í løn.

Hans Edward í The Dreams:

# Trið lekrast í heiminum

**Donsku tannáringa-genturnar hava talað. Nú er greitt hvørji mannfólk vóru tey lekrastu í 2008. Á triðja plássinum –frammanfyri mætar menn sum Brad Pitt, Orlando Bloom og Ronaldo- er Hans Edward Andreasen í The Dreams**

TOPPLISTI
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*



*Hans Edward Andreasen, forsangari í The Dreams, er av donskum tannáringagentum kosin at vera triðlekrasti maður í heiminum. Hann er langt frammanfyri kend nøvn sum Justin Timberlake, Leonardo DiCaprio, Brad Pitt og Beckham*

Í fleiri mánaðir hevur danska blaðið ”Vi Unge”, ið serliga vendir sær til gentur í tannáringaárunum, havt eina atkvøðugreiðslu koyrandi.

Nú ársskifti var, ráddi nevniliga um at finna útav, hvørji hundrað mannfólk vóru heimsins lekrastu í 2008. Hetta er ein gomul tradition hjá blaðnum, og listin verður gjørdur á hvørjum ári.

100 mannfólk úr øllum heiminum verða tilnevnd, og so kunnu lesararnir hjá blaðnum atkvøða um hvør er tann girndarmiklasti.

Ofta eru tað somu nøvnini, ið ganga aftur, men í ár vóru fleiri nýggj nøvn at finna. Eitt av teimum var Hans Edward Andreasen, sum kom beinleiðis inn á triðja plássi um at vera lekrasti maður í heiminum.

### Flent nógv

Tá Sosialurin ringir til trið lekrasta mann í heiminum, og biður um eina viðmerking til flotta úrslitið, er ein øgiligur látur.

– Ja, hvat skal man siga. Hatta er jú bara stuttligt. Og vit hava sanniliga eisini flent nógv at tí, sigur Hans Edward.

Hann greiðir frá, at hann fekk at vita, at hann fór at vera í uppskoti, tá ”Vi Unge” gjørdi listan, men hann hevði onga hóming av, at hann fór at enda heilt uppi í topp trý. Tað eru jú 100 nøvn á listanum, og flestu teirra eru kendir fyri.

– Tey spurdu um tey kundu brúka meg til handan listan, og tað helt eg vera í lagi. Eg hevði yvirhøvur ikki væntað, at eg fór at fáa so nógvar atkvøður.

Hann heldur, at tað eru nógvu donsku fjeppararnir hjá The Dreams, ið hava atkvøtt fyri honum.

– Tað eru fleiri, ið dáma The Dreams og okkara tónleik, og tað er nokk hagani atkvøðurnar stava, heldur hann.

Hans Edward greiðir frá, at hinir limirnir í bólkinum halda tað vera stuttligt, at hann er so lekkur. Men hann er ivaleysur í, at teir eisini verða á listanum komandi ár.

Tá hann verður spurdur um, hvat daman, sum eisini er nevd í Vi Unge í sambandi við triðjaplássið, sigur til at eiga triðlekrasta mann í heiminum, er svarið tað sama.

– Hon heldur tað vera stuttligt. Og hon hevur sanniliga eisini flent nógv at tí.

**Topp 50**

1 Zac Efron
2 Nic Jonas
3 Hans Edward Andreasen
4 Orlando Bloom
5 Bill Kaulitz
6 Joe Jonas
7 Christiano Ronaldo
8 Johnny Depp
9 Chad Michael Murray
10 Jesse McCartney
11 Danny McFly
12 Basim
13 Harry McFly
14 Tom Kaulitz
15 Chris Brown
16 Søren Bregendal
17 Ryan Sheckler
18 Heath Ledger
19 Bam Margera
20 Matt LeBlanc
21 Ben Barnes
22 Emil Debski
23 Kevin Jonas
24 Justin Timberlake
25 Wentworth Miller
26 Strify fra Cinema Bizarre
27 Pete Wentz
28 Oliver Bjerrehus
29 Corbin Bleu
30 Leonardo DiCaprio
31 Sebastian Agård-Wiliams
32 Sebastian Jessen
33 Johnny Knoxville
34 LOC
35 Felix Smith
36 Brad Pitt
37 Greard Way
38 Jay
39 Martin fra X-factor
40 David Beckham
41 Nik
42 Shia Labeouf
43 Daniel Radcliffe
44 Jared Leto
45 Rupert Grint
46 Chase Crawford
47 Jude Law
48 Anden
49 Jonathan Rhys-Meyers
50 Rafael Nadal



*Hesi tólini síggjast nú allstaðni í donsku býarmyndini. Talið veksur í stórum og er nú farið upp um 300.000*

# 300.000 upptøkutól halda eyga við dønum

**Stór ferð er á uppseting av upptøkutólum í almenna rúminum í Danmark. Árliga verða 60.000 sett upp um árið, og í dag halda yvir 300.000 upptøkutól eyga við dønum. Sjálvt upptøkuvinnan setir nú spurnartekin við, um tað er neyðugt við øllum hesum tólunum**

BIG BROTHER
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Danir verða filmaðir sum ongantíð fyrr. Hvønn einasta dag verður hvør dani, sum fer út um dyrnar hjá sær sjálvum, filmaður upp til fleiri ferðir.

Danska trygdarvinnan metir,, at tað í dag finnast yvir 300.000 upptøkutól í almenna rúminum í Danmark. Stendur tú á ein tokstøð, keypir inn í einum matvøruhaldli, fyllir bensin ella olju á bilin ella koyrir børnini í skúla, ja, so kanst tú vera vísur í, at tú verður filmaður á onkrum av hesum støðunum.

Hetta skrivar Berlingske Tidende.

Upptøkutólini verða sett upp fyri at ansa eftir ognum, sum fyribyrging ella váttan av kriminaliteti, og at fólk skulu kenna seg trygg á gøtuni.

Sambært stjóranum í vinnufelagnum hjá trygdarvinnuni, Kasper Skov-Mikkelsen, verða sett upp millum 50.000 og 60.000 nýggj upptøkutól um árin.

- Hetta er eitt øki, sum veksur øgiliga nógv í løtuni. Tað er stórt sæð ikki møguligt at fara inn í ein handil í dag, uttan at verða filmaðuri, sigur Kasper Skov-Mikkelsen við Berlingske Tidende. Hann metir, at tað bert fyri tveimum árum síðani vóru á leið 200.000 upptøkutól í Danmark.

Tað er í handilsvinnuni, at vøksturin í talinum av upptøkutólum er nógv tann størsti.

Sjálvur setir hann spurnartekin við gongdina.

- Vit eru noydd at spyrja okkum sjálvi, hvat vit vilja við øllum hesum upptøkutólum, og hvussu tey verða handfarin, sigur hann og eftirlýsir fleiri og greiðari reglur fyri hesi myndatøkuni.